ítróttur

Nr. 236 • leygardagur • 7. desember 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Stjørnan bliknar

**Klaksvíkingar mugu vera toppskjúttan og leikandi venjaran fyri uttan í óásetta tíð**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tríggir dystir í bestu kvinnudeildini verða leiktir hetta vikuskiftið. Fyrstur av teimum er tann í Vestmanna, har Stjørnan kemur á vitjan, og ivaleyst vóru tað mong, sum høvdu roknað við einum sera spennandi dysti her. Ikki minst tí Stjørnan veruliga tykist hava fingið gongd á eftir eina heldur laka byrjan upp á árið.

Men sum umstøðurnar hava lagað seg, so má VÍF sigast at vera greiður favorittur undan dystinum. Stjørnan noyðist nevnliga at vera leikandi venjaran og toppskjúttan, Daniella Ercevic, fyriuttan. Orsøkin eru boð um sjúku í nærmastu familjuni, og tískil hava klaksvíkingar hildið bestu ráðini vera, at venjarin slapp heim.

- Tað kemur sjálvandi illa við hjá okkum, at so er, heldur Geir Wardum, formaður í hondbóltsdeildini hjá Klaksvíkar Ítróttarfelag.

- Liðið tykist hava fingið betri tak á spælinum seinastu dystirnar, og sum kappingin hevur lagað seg, so kundu vit flutt okkum heilt langt upp við einum sigri.

- Hinvegin, so fært tú ikki vart teg fyri slíkum, og sjálvandi taka vit menniskjansligu atlini framum, tá so er. Akkurát hvat nú fer at henda, veit eg ikki, men vit vóna, at Natasa Stamenkmovic kann taka við sum fyribils venjari.

Hvussu leingi hetta kemur at standa við í Klaksvík, vita tey enn ikki at siga, men verður hetta nakað, sum partarnir fara at gera av í felag.



*Stjørnurnar úr Klaksvík eru munandi skerdar, tá tær leygardagin vitja lokalu stjørnurnar í Vestmanna*

### Spenningurin í hásætið

Tveir aðrir dystir verða eisini leiktir um vikuskiftið. Í Vági verður spenningurin helst stórur, tá Kyndil kemur á vitjan. Enn einaferð fekk Kyndil sveiggjað seg upp, tá mótstøðuliði var VÍF, og so er spurningurin, um tær megna at halda ferðini móti VB, sum annars tapti sín fyrsta dyst hetta kappingarárið, tá tær seinasta vikuskifti spældu á Skála.

Og so verður eisini dystur millum Neistan og StÍF í Havn. StÍF hevur nú vunnið seg upp á næst ovasta sessin í deildini, og einki er at ivast í, at tær vilja verja hendan. Hinvegin so eru treytirnar hjá Neistanum purasta greiðar. Tær skulu hava tvey stig, um tær ikki skulu missa oddin heilt burtur, so tað verða tvey lið, sum eru svong eftir stigum, ið fara á vøllin.

## B68 fær nýggjan málverja

**Tað verður ikki Michael Kokoszanek, sum verður í mál hjá toftamonnum komandi árið. Í løtuni tykist Tróndur Vatnhamar vera besta boðið um ein nýggjan málverja**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Í fjør høvdu toftamenn pólverskan málverja á besta fótbóltsliðnum, men í ár røkist fyri, at talan verður um føroyska loysn.

Ymisk nøvn hava verið sett í samband við árstalsfelagið, men nú bendir nógv á, at talan verður um B36-málverjan, Trónd Vatnhamar. Tróndur vardi málið, tá B36 gjørdust meistarar í 2001, men í ár hevur spælitíðin verið lítil. Ikki minst eftir at hann í dysti móti júst B68 varð skaddur, og tá avloysari hansara stóð seg somikið væl, vann hann ikki plássið á besta liðnum aftur.

Formaðurin í B68, váttar eisini fyri Sosialinum, at samband hevur verið millum B68 og Trónda Vatnhamar, men hóskvøldið segði hann tað framvegis vera ov tíðliga at staðfesta, hvørt málverjin var á veg til felagið ella ikki.

- Har er so eingin avtala komin upp á pláss enn, og fyrr enn tað er greitt, kann eg ikki svara nøkrum, var einasta viðmerkingin, sum vit fingu frá B68-formanninum.

# Grundspælið nærkast avgerðini

**Býti av ovastu sessunum í grundspælinum nærkast av álvara eini avgerð**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eins og hjá kvinnum, so verður talan um tríggjar mansdystir í hondbólti um vikuskiftið.

Tveir teirra verða leygardagin, og í báðum førum er talan um grannauppgerðir. Í Hoyvík tekur H71 ímóti Kyndli, sum seinasta vikuskifti sýndi, at teir eru á veg upp úr aldudalinum, sum annars tóktist hava rakt liðið. Fær Kyndil spælið frá tí dystinum framaftur, so er einki at ivast í, at teir eru favorittar, men hinvegin er einki at ivast í, at hoyvíkingar fara at stríðast fyri sínum møguleika, ogso teir grønu skulu undir øllum umstøðum ansa sær.

Fram til heta kappingarárið átti KÍF heimavøll í Vestmanna, so tað er ikki á nakran hátt fremmant fyri teir, tá teir far á vitjan hjá VÍF leygardagin. Og nógv bendir á, at talan verður um ein spennandi dyst. Søguliga hava dystirnir seinnu árini verið sera javnir millum grannarnar, og fyrra dystin í grundspælinum eydnaðist kollfirðingum at vinna, so í øllum førum tykist einki avgjørt undan dystinum.

Seinasti dysturin um vikuskiftið verður millum Neistan og StÍF. Hetta eru liðini, sum eru á ávíkavist triðja og fyrsta plássi í deildini, og tí er einki at ivast í, at talan verður um spennandi uppgerð. Í umvenda dystinum á Skála var tað ikki fyrr enn í allar seinastu sekundunum, at ein avgerð fall.

Fyri endaliga útfallið av grundspælinum hava allir tríggir dystirnir sjálvsagt stóran týdning, so alt talar fyri, at føroysku hondbóltsáskoðararnir hava nakrar spennandi dystir at síggja fram til.



# ÍF skal verja borg í Klaksvík

**Nýggja oddaliðið hevur týdningarmikla og trupla uppgávu í Klaksvík, og í Havn fæst at vita, hvussu álvarsligur smeiturin hjá TB var**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Kunning frá FBF*

Tapið fyri ÍF seinasta leikumfar man svíða nakað illa á Tvøroyri. Tað var væntandi, at ÍF fór at geva TB harða mótstøðu, men at ÍF skuldi vinna so sannførandi sum 3-0 var púra óvæntað, og tað gevur Fleyr kanska trúnna upp á tað ómøguliga. Tað tykist í hvussu er so, at TB er til at tosa við, og seinasta leikumfar var Fleyr um at vinna á Drátti, so alt bendir á, at havnaliðið er á veg úr aldudalinum, og at TB kanska er farið nakað tíðliga í jólafrí.

### Dráttur rættiliga við aftur

Vinnur Dráttur á KÍF, so er vágaliðið rættiliga við aftur í kappingini. KÍF fekk síni fyrstu stig ímóti Fleyr, men seinasta dyst formáddi KÍF sær púra einki ímóti Mjølni, og tí er Dráttur favorittur undan hesum dystinum.Bæði liðini hava nakað at prógva í hesum dystinum. KÍF kann við einum sigri vísa, at tær eru ikki botnliðið. Dráttur kann við sigrinum vinna sær góða støðu og rættiliga koma við í oddastríðið. Vinnur Dráttur ikki, so mugu tær helst taka til tokka við at vera "millumlið" millum toppin og botnin í bestu kvinnudeildini.

### Toppdystur í Klaksvík

Allar fortreytir eru fyri rættiligum braki í Klaksvík sunnudagin. Tvey av allar bestu liðunum í kvinnudeildini bresta saman í enn einum oddadysti. Av tí at liðini eru so serliga jøvn í kvinnudeildini í ár, so verða oddadystirnir nógvir. ÍF fer til Klaksvíkar við fullari skjáttu av sjálvsáliti eftir framúrskarandi sigurin á TB. ÍF hevur eisini fyrra dystin ímóti Mjølni at hevna. Tann dystin vann Mjølnir akkurát 3-2.

Tað munnu vera nógv harrans ár síðan, at ÍF er favorittur ímóti Mjølni í Klaksvík, men sum gongdin hevur verið hjá ÍF hetta kappingarárið, so er liðið so mikið væl fyri júst nú, at tær eru tær bestu í landinum í løtuni. Verður hugt at hagtølunum, so er Mjølnir væl omaná, men hagtøl siga ikki allan sannleikan. Hann er, at um ÍF vinnur í Klaksvík, so vinna tær fyrru hálvu av kappingarárinum, og fara undir seinnu hálvu á odda. Helst verður TB ájavnt í stigum og Mjølnir kanska eisini.



*ÍF er nú nýtt oddalið í kvinnudeildini. Skulu tær halda fast um hetta heiti, er ivaleyst neyðugt við einum sigri, tá tær vitja hjá einum av argastu mótstøðuliðunum. Nevnliga Mjølnir*

## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**

1. deild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 07.12 | 14.30 | VÍF-Stjørnan |
| 08.12 | 14.30 | Neistin-StÍF |
| 08.12 | 15.00 | VB-Kyndil |

1. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| 07.12 | 16.00 | H71-Kyndil |
| 07.12 | 16.00 | VÍF-KÍF |
| 08.12 | 16.00 | Neistin-StÍF |

**Flogbóltur**

Meistaradeild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 07.12 | 13.00 | Fleyr-TB |
| 08.12 | 13.00 | KÍF-Dráttur |
| 08.12 | 13.00 | Mjølnir-ÍF |

Meistaradeild menn

| | | |
|---|---|---|
| 08.12 | 15.00 | Fram-SÍ |
| 08.12 | 15.00 | MjølnirÍF |

## Hondbóltsstøður

### 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 8 | 7 - 0 - 1 | 197 | 163 | 34 | 14 |
| 2 | VÍF | 9 | 5 - 0 - 4 | 202 | 174 | 28 | 10 |
| 3 | StÍF | 9 | 5 - 0 - 4 | 212 | 218 | -6 | 10 |
| 4 | Stjørnan | 8 | 4 - 1 - 3 | 179 | 172 | 7 | 9 |
| 5 | Kyndil | 8 | 4 - 0 - 4 | 197 | 187 | 10 | 8 |
| 6 | Neistin | 9 | 3 - 1 - 5 | 167 | 185 | -18 | 7 |
| 7 | Tjaldur | 9 | 1 - 0 - 8 | 176 | 231 | -55 | 2 |

### 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | StÍF | 10 | 8 - 0 - 2 | 294 | 253 | 41 | 16 |
| 2 | VÍF | 10 | 6 - 1 - 3 | 313 | 257 | 56 | 13 |
| 3 | Neistin | 9 | 6 - 0 - 3 | 258 | 243 | 15 | 12 |
| 4 | Kyndil | 9 | 4 - 2 - 3 | 246 | 238 | 8 | 10 |
| 5 | KÍF | 9 | 3 - 1 - 5 | 233 | 233 | 0 | 7 |
| 6 | H71 | 9 | 2 - 0 - 7 | 210 | 262 | -52 | 4 |
| 7 | Tjaldur | 10 | 2 - 0 - 8 | 242 | 310 | -68 | 4 |

## Flogbóltsstøður

### Meistaradeild, kvinnur

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 8 | 6 - 2 | 22 | 11 | 11 | 12 |
| 2 TB | 8 | 6 - 2 | 20 | 9 | 11 | 12 |
| 3 Mjølnir | 7 | 5 - 2 | 18 | 9 | 9 | 10 |
| 4 Dráttur | 7 | 4 - 3 | 15 | 16 | -1 | 8 |
| 5 KÍF | 8 | 1 - 7 | 6 | 21 | -15 | 2 |
| 6 Fleyr | 8 | 1 - 7 | 6 | 21 | -15 | 2 |

### Meistaradeild, menn

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 6 | 6 - 0 | 18 | 0 | 18 | 12 |
| 2 Mjølnir | 4 | 3 - 1 | 9 | 5 | 4 | 6 |
| 3 Fram | 6 | 3 - 3 | 11 | 9 | 2 | 6 |
| 4 SÍ | 5 | 2 - 3 | 6 | 9 | -3 | 4 |
| 5 Fleyr | 7 | 0 - 7 | 0 | 21 | -21 | 0 |

# Brak í Klaksvík

**Skal nakar taka ÍF, so má tað helst verða Mjølnir, og á heimavølli átti fortreytirnar fyri hesum at verið so góðar, sum tað nú eina ferð er gjørligt**

MANSFLOGBÓLTUR
*Kunning frá FBF*

Hjá monnunum eru tveir spennandi dystir á skránni hetta vikuskiftið. Í Havn skulu Fram og SÍ gera av hvat av hesum liðunum skal taka dystin upp við ÍF og Mjølnir um gullið. Fram tapti seinast fyri Mjølni og SÍ vann sannførandi á Fleyr. Í fyrra dystinum millum SÍ og Fram vanna Fram sannførandi 3-0, og sum skilst, so er ivasamt um Borko Ilic verður við hjá SÍ. Verður hann ikki tað, so er uppgávan hjá Fram munandi lættari. Hjá SÍ er alneyðugt at fáa nøkur stig.

### Styrkisroyndin

Klaksvíkin er rættiliga karmur um oddastríðið í flogbólti hetta vikuskiftið. So avgjørt mest spennandi dysturin hetta kappingarárið hjá monnunum verður sunnudagin. ÍF hevur higartil vunnið alt sera sannførandi, og tað er ógvuliga torført at síggja nakran veikleika við liðnum. Hetta er nakað av tí besta, ið til ber at seta saman í Føroyum.

Mjølnir var á Kambsdali tíðliga í kappingarárinum, og tá gekk heilt illa. Tað fréttist úr Klaksvík, at liðið nú er munandi betur samanspælt, og at útlendingarnir báðir eru komnir fyri seg av álvara. Mjølnir vann á Fram seinasta leikumfar, og tá vísti liðið sera gott spæl til tíðir, men ímóti ÍF skal hetta góða spælið vera frammi alla tíðina, um hugsingur skal vera um at geva ÍF fyrst ósigurin.

Mjølnir er í tí støðu, at teir hava tveir útsettar dystir. Báðir eru ímóti SÍ. Spælir Mjølnir síni kort væl, so kunnu teir tær næstu tvær vikurnar vinna oddasessin í bestu mansdeildini. Fyrsta og týdningarmiklasta stigið verður tikið sunnudagin ímóti ÍF.